# Seinasta triathlonkappingin í ár

**Føroya Triathlon Felag skipaði sunnudagin kl. 13.00 fyri FM í 1/4 triathlon, sokallaða OL-teininum, sum er 1500 m svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning.**



*Gunnar Dahl Olsen vann seinastu kappingina á árinum, og var hann knappar fimm minuttir undan næsta luttakaranum*

TRIATHLON
*tíðindaskriv*

Føroyameistari 2003 gjørdist Gunnar Dahl Olsen, tá hann við góðari súkkling vann fram um Eli Christiansen, sum var undan honum úr hylinum, og eisini skifti skjótari til súkkling og rann eitt sindur skjótari enn Gunnar.

Nakað aftan fyri teir kom so Beinir Rasmussen, hann var nummar fýra úr hylinum, men skifti skjótast og súkklaði seg til eitt triðjapláss. Hinir báðir íðkararnir, Evald Rasmussen og Kári Simonsen komu á mál í hølunum hvør á øðrum.

Hesaferð eydnaðist hjá Kára at vinna á Evaldi, tí hann hesaferð, umframt at súkkla og renna skjótari, eisini skifti skjótari.

### Skiftini nógv at siga

Tað er soleiðis í triathlon, at tá skift verður millum ítróttagreinirnar, mugu íðkararnir eisini skifta í klæðir, sum hóska til ítóttagreinina.

Fyrsta skiftið er frá svimjingini til súkklingina, og skal íðkarin renna frá svimjihylinum til súkkluna, sum stendur uttanfyri, á vegnum skal so hann skifta í súkkluklæðir.

Annað skiftið er frá súkkling til renning, og er tá "bara" at fara úr súkkluskónum og í renniskógvarnar, og so avstað.

Hesi skifti verða ofta rópt "gloymda ítróttagreinin", tí íðkararnir geva skiftunum ov lítlan ans, og missa nógva tíð óneyðugt. Ofta er munurin millum íðkararnar fleiri minuttir, og serliga ein dag sum hendan, tá tað regnaði og var kalt, og menn ikki eru vanir at skifta klæðir vátir og loftnaðir.

Verður hugt eftir úrslitatalvunum, sæst ein stórur munur í tíðunum til skiftini, og er hetta tí at íðkararnir lótu seg væl í sunnudagin, tí ikki er tespuligt at fara út við vátum hári, stuttum ermum og stuttum brókum.



*Skiftini í triathlon hava nógv at siga*

## Úrslit, FM í 1/4 triahtlon:

| Nr. | Navn | Svimjing | Skift 1. | Súkkling | Skift 2. | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Gunnar D Olsen | 23.16 | 3.40 | 1.05.39 | 0.53 | 46.01 | 2.19.33 |
| 2. | Eli Christiansen | 23.00 | 3.27 | 1.11.59 | 1.03 | 43.48 | 2.24.15 |
| 3. | Beinir Rasmussen | 26.53 | 2.33 | 1.14.31 | 1.18 | 50.15 | 2.35.30 |
| 4. | Kári Simonsen | 29.00 | 3.00 | 1.23.08 | 0.45 | 53.31 | 2.49.24 |
| 5. | Evald Rasmussen | 24.44 | 2.47 | 1.28 38 | 0.59 | 55.33 | 2.52.24 |

# Nýtt Holte lið tapti

**Holte hevur mist nógv fólk undan hesum árinum, og vera tí helst ikki við í oddastríðnum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Flogbóltskappingin í Danmark byrjaði um vikuskiftið. Her hevur føroyski áhugin seinnu árini serliga verið í Holte, har Bárður Bendix Mikkelsen hevur verið partur av liðnum, sum hevur verið við í oddastíðnum, og sum eisini vann steypakappingina í fjør.

### Mist nógv

Í ár hevur felagið eisini fingið enn eitt føroyskt ískoyti, og er tað Ragnar í Haraldsstovu, sum nú er komin afturat Bárði.

Hinvegin hevur felagið mist fleiri av leikarunum frá í fjør, og tí verður talan helst um eitt yvirgangsár, har nýggir og ungir leikarar skulu spælast inn á liðið.

Hetta var eisini sjónligt, tá Holte var á vitjan hjá Marienlyst Volley í Odense. Marienlyst er millum favorittarnar í ár, og tó at Holte gjørdi góða mótstøðu, so endaðai alt við einum tryggum 3-0 sigri til vertirnar.

Dysturin var annars nummar 100 hjá Bárði í bestu donsku deildini, og í ár er líkt til, at hann eisini fer at fáa møguleikan at umboða felagið í altjóða høpi. Her hevur trupulleikin annars verið, at holte ikki vilja goldið fyri at fáa spæliloyvið til Europa-Cup dystirnar, men tann forðingin er so burtur nú, og tí verður Bárður væntandi við, tá Holte seinast í mánaðinum fer til Letlands, har 2. umfar av Top Teams Cup er á skránni.

# Steypakapping í Havn

**Lagt verður til brots við flogbóltinum um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Komandi vikuskifti verður flogbóltur aftur á skránni, og er tað steypakappingin í Havn, sum fyrst stendur fyri tørni. Hetta er samstundis kappingin, har fyrsti luttakarin til steypafinaluna verður funnin.

Øll liðini í meistaradeildunum hjá monnum og kvinnum hava boðað frá luttøku, og í eftir at innleiðandi dystirnir verða leiktir leygardagin, verður finalan í kappingini leikt í Høllini á Hálsi sunnudagin.



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3302, Sp/f Føroya Oljusøla, 100 Tórshavn.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Frank Jacobsen, Íslandsvegur 30, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 6. oktober 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3448, Sp/f Bátasølan, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 13.08.2003.
**Nýtt hjánavn:** Sp/f Bát (Sp/f Bátasølan)

*Skráseting Føroya tann 6. oktober 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1203, P/F Sveipur, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin frá sum formaður:** Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum formaður:** Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum stjóri:** Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 6. oktober 2003*

*Kristin Balle*

BILSKROKK
www.bilskrokk.fo
Lakkering & Plátuverkstaður
Vit hjálpa fólki við bilskaðum/ tryggingarskaðum, lakkering, buglum, rusti og mangt annað.
Ring til okkum og fá eitt gott tilboð.
- Tlf. 32 24 71 -
Slættanesgøta 9 - boks 2227 - Fo-110 Tórshavn

FISKISKIRANNSÓKNARSTOVAN
Fiskamerkir
Seinasta freist at lata fiskamerkir inn, sum skulu luttaka í lutakasti um 10.000 kr., er 20. oktober.
Fiskirannsóknarstovan
Nóatún 1
Postsmoga 3051
110 Tórshavn

www.sosialurin.fo

Grundstykki til sølu
Grundøki í Toftalíð í Vági ca. 600 $m^2$ við sera góðum útsýni til sølu.
Tlf. 281303

BILSKROKK
www.bilskrokk.fo
Lakkering & Plátuverkstaður
Vit søkja eftir fólki til plátuverksmiðjuna. Viðkomandi skal verða lærdur/royndur bilsmiður og skal kunna arbeiða fulla tíð og sjálvstøðugt.
- Tlf. 32 24 71 -
Slættanesgøta 9 - boks 2227 - Fo-110 Tórshavn

MS Fagráenni

til sølu v/ fiskiloyvi. Báturin er væl útgjørdur, egningarmaskinu, ísmaskinu og snellir.
Tlf. 752093

Norðoya Javnaðarfelag
Aðalfundur verður 20. oktober kl. 19.00.
Skrá sambart lógum felagsins.
Nevndin

Til Sølu

IVECO 85E21 við 6 tons krana, 3 vegis vippu og hydralikk baklúku. Motorur 210 HK, koyrt 89.000 km.
Telefon 312779 ella 212779
Sosialurin 341800

Landsfundur 2003
Landsfundur Javnaðarfloksins 2003 verður hildin í Hvalba í døgunum 14.-15. nov.
Nærri verður lýst seinni.
Føroya Javnaðarflokkur

JPS maskinverkstaður
Vit átaka okkum –
Alt smiðjuvirksemi
Motorumvælingar
Stálarbeiði / sveising
Hita & sanitet

Sp/f JPS maskinverkstaður
FO-627 Lamba
Sjúrður: tel 217513 / 447513
Jákup Petur: tel 221755
Sosialurin 341800

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Sosialurin -tað loysir seg